## Sjóvar prestagjald fevnir um kirkjurnar á Selatrað, á Strondum, á Skála og í Oyndarfirði

# Sum tín dagur skal tín styrki vera

### Tríggjar skipsvanlukkur og vanlagnur merktu tíðina hjá Jógvani Fríðriksson sum presti á Gjaranesi frá 1992 til 2007

Vanliga er hann sera lættur á sporinum.

Henda dagin á krossmessu í 1870 eru fetini hjá próstinum á Nesi tó ógvuliga tung.

Eftir at hava gingið norður gjøgnum dalar og upp um fjøll heilt av Nesi uttast á Skálafjørðinum sær hann nú oman á bygdina við Gjógv.

V. U. Hammershaimb suffar tungliga.

Hann hevur frætt um tann ófatiliga sorgarleikin, sum rakti bygdina 30. apríl.

Tveir bátar frá Gjógv gingu burtur hendan dagin.

Bygdin misti heilar 16 mans.

Prósturin er komin norður at hitta tey eftirsitandi.

At veita teimum troyst og ugga.

Komin oman at bøgarðinum nígur prósturin niður á knæ.

Hann heitir á hirðan hin altvaldandi um at beina leiðina hjá øllum teimum syrgjandi, ið innan fyri henda garð eru, til ta einastu kelduna, har sálarbót er at oysa av.

Síðani gongur hann oman til bygdina.

Nærum 130 ár seinni, í 1998, fer ein prestur í prestagarðinum á Gjaranesi við somu ørindum sum Hammershaimb á sinni at vitja tey eftirsitandi, nú ein ófatiligur sorgarleikur hevur rakt eina bygd og nógv hava mist.



Prestagarðurin á Gjaranesi

Ein bátur av Strondum er gingin burtur.

Bygdin hevur mist 5 mans.

Eins og við Gjógv fer hesin sorgarleikur eisini fram í apríl mánaði, tá grasið grønkast, blómurnar spretta og lýggja lotið boðar frá, at várið er komið.

Í sálardýpinum hjá øllum teimum, sum varða av, grør tað tó ikki um gangandi fót.

Í 1878 situr Hammershaimb á prestagarðinum á Nesi, sum hann hevur latið byggja í 1863 og sum kona hansara hevur teknað. Hann hevur verið runt og sagt farvæl, tí nú skal hann flyta til Danmarkar við húski sínum.

Tað hevur verið strævið hjá honum at verið einsamallur hirði hjá øllum eysturoyingum.

Einsamallir hirðar fyri alla Eysturoynna hava 10 próstar og nógvir prestar verið undan honum, síðani Heini Havreki sum fyrsti próstur í Føroyum búsettist her á Nesi í 1541.

Viðkvæma lyndi og kensluborna sinni hansara hevur mangan bløtt í samhuga við øllum teimum í prestagjaldinum, sum mist hava. Ofta hevur hann kent avmakt og orð hava fattast honum, tá hann í táravættum eygum á einkjum, mammum og børnum hevur sæð svára sorg og miklan trega. Tað er ikki lætt at tosa um miskunn og náði við tey, ið mist hava, men vónina sleppur Hammershaimb ongantíð úr eygsjón. Tað er hesa vón, hann sum sálarhirði roynir at styrkja tey við.

Vónina og lyftini um, at ein dag skulu øll hittast aftur í dýrdini.

Síðani hann gjørdist prestur her á Nesi í 1862 - og í 1867 varð settur sum próstur - hava ofta boð verið eftir honum frá fólki kring alla oynna, tá vanlukkur og skaðatilburðir hava rakt.

# Prestar í Sjóvar prestagjaldi

Fyrsti presturin á Gjaranesi verður innsettur í Sjóvar kirkju 4. juli 1971. Tað er **Jákup Magnussen** (1915-2005). Hann er prestur á Gjaranesi til 1973.


Niels Pauli Danielsen

Næsti presturin er **Niels Pauli Danielsen** (f. 1938). Hann verður innsettur 7. oktober 1973. Niels Pauli verður tann fyrsti sóknarpresturin í *Sjóvar prestagjaldi*, sum verður sett á stovn 1. sept. 1974. Hann er prestur í Sjóvar prestagjaldi til seint í 1980.

3. august 1980 verður **Petur Petersen** (1923-2007) innsettur í Sjóvar kirkju.


Jógvan Fríðriksson

1. mars í 1992 verður **Jógvan Fríðriksson** (f. 1957) settur sóknarprestur í Sjóvar prestagjaldi. Hann er prestur har til 2007.

**Henning Bøgesvang** tekur við sum fyribils settur sóknarprestur í Sjóvar prestagjaldi 1. mars 2008.


Símun P. Jacobsen

Síðani 17. janur 2010 hevur **Símun Persson Jacobsen** (f. 1971) verið sóknarprestur í Sjóvar prestagjaldi

**Keldur:** Oluf Djurhuus: *At loysa úr lagdi*, *Sjóvar kommuna*

Fleiri tilburðir av slíkum slag daga nú fram í tilvitsku hansara, nú hann skal fara av Nesi.

Hann hyggur yvir á Flesjarnar.

Longu trý ár eftir, at hann var komin higar á Nes, sakk ein bátur, sum hevði verið í Havn eftir salti, við Flesjarnar. Hetta var í 1865.

Báturin var av Strondum.

Báðir menninir, sum vóru við bátinum, brøðurnir Jóhannes og Pól á Dunganum, umkomust.

Ein av prestbátunum róði Hammershaimb yvir á Strendur, har hann vildi royna at veita teimum avvarðandi troyst.

Prósturin veit ikki, tá hann gongur millum húsini í Gerðum á Strondum, at hetta ikki er seinasta bátsvanlukkan, sum rakar hendan býlingin. Hetta er heldur ikki seinasta bátsvanlukkan, ið rakar hesa bygd.

Hann verður ikki tann seinasti presturin, sum vitjar avvarðandi á Strondum, sum mist hava menn, pápar og synir á sjónum.

Tað koma próstar og fleiri prestar á Nesi at gera eftir hann.

Frá 1971 eisini prestar á Gjaranesi fyri Innan Glyvur.

Tað er gott veður um morgunin hin 9. februar í 1889, men so trilkar hann lotið og tað verður eitt slíkt himmalsins ódnarveður við kavaroki, sum menn valla minnast at hava verið áður.

Á Nesi og í prestagarðinum stendur um húsbrot. Tað er ikki útfarandi.

Í hesum ódnarveðrinum og í sjórokinum sæst ein bátur koma rógvandi inn um Eystnes. Hann tekur seg spakuliga fram inn móti bygdini Nes, men seint gongur, ógvuliga seint.

Har sita fýra mans á bekkunum og taka í árarnar. Andróðurin er øgiligur og mátturin er við at ganga undan hjá hesum monnum.

Nesmenn síggja bátin nærkast lendingini og teir gera seg klárar at taka ímóti hesum útlúgvaðu, deyðkomnu monnunum.

Teir kenna væl bátin. Hetta er *Bøbáturin* á Strondum.

Prósturin Jens Chr. Evensen sær úr stovuvindeyganum á prestagarðinum, hvussu leikur fer.

Um 5 tíðina taka sterkir armar ímóti báts-

manningini, tá teimum umsíðir eydnast at seta upp.

Hjálpsamir menn á Nesi og á Toftum rógva teir seinni við einum vælmannaðum áttamannafarið yvir um fjørðin.

Prósturin Jens Chr. Evensen strýkur sær niður eftir skegginum. Herðarnir eru kropnaðir og eyguni eru táravætt.

Feigdin hevur rakt bygdina Strendur hinumegin fjørðin.

Báturin innan úr Bø sleit við mikið strev upp land í ódnarveðrinum 9. februar, men tveir aðrir bátar í bygdini komu ikki aftur hendan dagin.

Báðir Gerðabátarnir eru gingnir burtur.

Ikki færri enn 7 mans úr tveimum grannahúsum í býlinginum í Gerðum hava fingið sína vátu grøv har úti á havi.

Tað stendur nógv á Evensen.

Hann biður hin Alvaldandi um at geva sær styrki. Styrki til at kunna veita teimum avvarðandi á Strondum hjálp og ugga. Styrki til at vísa teimum á Hann, sum øllum ræður – honum, sum alt valdið hevur á himni og á jørð.

Hetta verður ikki lætt, nú býlingurin í Gerðum er fallkomin.

So gevur hann húskøllunum boð um at flota bát og rógva seg yvir á Strendur.

Hundrað ár seinni raka skipsvanlukkur aftur bygdina við somu styrki og við sama vavi.

Innan fyri eitt 4 ára skeið ganga 3 skip burtur.

*Sjóborgin* ferst fyrstu ferð 1. september 1994, *Stathav* ferst 2. december sama ár og *Sjóborgin* ferst aftur aðru ferð norðan fyri Føroyar 2. apríl í 1998.

7 strandingar og ein havnarmaður við tøttum tilknýti til bygdina sjólátast.

Hetta er ein ófatiligur smeitur hjá teimum avvarðandi og fyri alt bygdarfólkið.

Jógvan Fríðriksson er prestur á Gjaranesi.

Øll tey avvarðandi eru sóknarbørn hansara. Einkjur og børn, pápar og mammur, ommur og abbar.

Hesi skal hann nú hitta, tí hann er hirði teirra.

Hann kennir seg hjálparleysan og veikan.

Seinast í 1800-talinum hevur sluppfiskiskapurin tikið seg fram av álvara og fólkatalið í teimum 7 prestagjøldunum veksur í Føroyum.

Suðuroyggin verður í 1913 býtt sundur í 2 prestagjøld: Suðuroyar norðara og Suðuroyar sunnara prestagjald.

Eysturoyggin verður eisini ov fjølbygd hjá einum presti at røkja og í 1928 verða sóknarbørnini í oynni býtt millum Nes prestagjald og Fuglafjarðar prestagjald.

Nú gongur skjótt.



## Sjóvar prestagjald

Føroyar tykjast tíðliga í tíðini at hava verið býttar sundur í 7 prestagjøld, sum hvørt hevði sín sóknarprest.

Hetta býti stóð við til 1913.

Í 1928 varð Eysturoy býtt sundur í Nes prestagjald og Fuglafjarðar prestagjald.

Seinast í 1960-árunum verður samtykt at seta ein prest afturat á vestara armi á Skálafjørðinum, sum skal verða hjálparprestur í Nes og Fuglafjarðar prestagjaldi.

Nakað av tvídrátti stóðst millum bygdirnar Skála og Strendur, hvar prestagarðurin skuldi standa, men Jákup Joensen, varabiskupur, fann eina loysn á ósemjuni og letur prestagarðin byggja á Gjaranesi fyri Innan Glyvur í 1971.

Palli Gregoriussen teknaði prestagarðin og Sandur Danielsen, timburmaður, stóð fyri bygginini.

At hjálpa sær hevði hann m.a. Sofus í Selvindi, Edmund í Króki, Poul Georg, Karl á Hulk og Jákup á Lag.

Múraraarbeiði gjørdi Jóhan David Davidsen á Skála.

Málaraarbeiðinum stóð Arnbjørn Mouritsen í Havn fyri.

Danir løgdu takið á.

Fyrsti presturin varð innsettur 4. juli 1971.

Sóknarprestaembætið varð sett á stovn hin 1. september 1974 og fær navnið *Sjóvar prestagjald.*

Til Sjóvar prestagjaldi hoyra kirkjurnar á Selatrað, á Strondum, á Skála og í Oyndarfirði.

**Keldur:** Oluf Djurhuus: *At loysa úr lagdi,* Sandur Danielsen

## Selatraðar kirkja



3. jóladag í 1925 kallaði Andrias Weihe fólkið saman til fundar í skúlanum og segði fram hugsan sína um at fáa kirkju aftur til bygdar. Tá hevði Selatrað verið uttan kirkju í 300 ár. Hann segði, at hann hevði tosað við sóknarprestin, K. Vilhelm Nielsen, og hann var sera áhugaður í hesi søk.

Alt fólkið tók væl ímóti hesum ætlanum og lovaðu at stuðla so væl tey kundu. Ein innsavningarlisti var gjørdur. Andrias Weihe setti seg sjálvan ovast á listan við 1.500,- kr.. Innsavningin fór so í gongd, fyrst á Morskranesi og Selatrað, og so víðari runt alt landið.

Undirtøkan var sera góð, tí tað sæst á innsavningar-listanum, at vanligir fiskimenn hava givið upp í hálva årsinntøku. Føroya Løgting gav 3.000,- kr til arbeiðið.

Steingrímur Winther gjørdi tekningina, stuðlaður av einum felag fyri betri byggisiði. Emil Olsen og John Johannesen í Leirvík stóðu fyri stoypingini, meðan verkstaðið hjá Sámal Ellefsen og Heina Joensen í Miðvági stóð fyri timbur- og málaraarbeiðinum.

Longu fyri jól árið eftir, í 1926, stóð kirkjan klár at taka í brúk, men av tí, at kirkjan var nýmálað, vórðu teir samdir um at bíða við vígsluni til 4. sunnudag eftir trettanda árið eftir

Jákup Dahl próstur vígdi kirkjuna.

**Kelda:** *Fólkakirkjan*

Í 1934 verður Norðoya prestagjald býtt sundur í Norðoya eystara og Norðoya vestara prestagjald og í 1947 verður Eiðis prestagjald sett á stovn.

Fólkatalið í Eysturoynni veksur alsamt og í 1960-árunum kemur ynski fram um at seta ein prest á vestara armi á Skálafjørðinum, sum skal verða hjálparprestur hjá prestunum á Nesi og í Fuglafirði.

Prestar býta fólkið upp millum sín og skulu røkja eitt ávíst tal av kirkjum.

Presturin á Gjaranesi skal røkja kirkjurnar á Selatrað, við Sjógv á Strondum, á Skála og í Oyndarfirði.

Prestagarðurin verður bygdur á Gjaranesi fyri Innan Glyvur.

Hann er ikki liðugur, tá tann fyrsti presturin verður innsettur í embætið 1. juli í 1971 og presturin sleppur tí ikki inn í húsini fyrr enn seinni á árinum.

Konfirmatiónin hetta heystið verður tí ikki fyrr enn í november mánaði.

Tað er opið hús í prestagarðinum á Gjaranesi í dag.

Jógvan Fríðriksson er 1. mars í 1992 settur sum sóknarprestur í Sjóvar prestagjaldi.

Strandingurin er komin aftur á heimliga grund.

Konan, Maria, er av Skála. Hon kann úr køksvindeyganum á prestagarðinum líta inn á sína kæru heimbygd.

Jógvan er blíður og prátingarsamur sum altíð. Hann hevur lætt til látur.

Pápi hansara, Frederik, situr so breiður á einum stóli. Hann sigur ikki so nógv, men tað, sum hann sigur, situr væl.

Mamman, Elsebeth Malena, stákast úti í køkinum.

Bygdarfólkið og fólk úr øðrum bygdum í prestagjaldinum kenna væl Jógvan aftur, hóast hann hevur verið leingi burtur – fyrst niðri á lærdum háskúla í Århus og so sum prestur á Viðareiði í 6 ár.

Grundin, muran, í honum er hin sama, sum tá hann sum smádrongur og unglingi gekk á leiðini úti í Stovugerði og runt um í bygdini, men omaná grundina er nú komin ein yvirbygningur.

Lærdi lesturin hevur givið hugflognum nýggj



**Jógvan Fríðriksson**

hugtøk at arbeiða við. Lesturin hevur eisini givið sjónarringinum víðari ræsur og lívsroyndirnar hava slípað kantarnar av avgjørdu meiningum hansara frá unglingaárunum. Íborna empatiska medvit hansara er nú heilt loyst úr fjøtrum og hevur evnað eina persónmensku, sum er fevnandi og djúptøkin. Lívsvísdómur hevur fjálgað um dygdir hansara til at liva seg inn í tað, sum rørist í náttúruni og í sálardýpinum á med-menniskjunum.

Barnatrúgv hansara liggur óspilt djúpt inni í hjartanum. Hon sæst aftur í medferð hansara.

Jógvan skal nú starvast sum prestur millum sóknarbørnini í Sjóvar prestagjaldi.

Hann kennir tey flestu.

Jógvan fegnast um tað góða samstarvið, hann hevur við kirkjuráðini og við allar kirkjutænar-



Asbjørg á Hálvmørk, kirkjuráðsformaður á Strondum

arnar, sum eru knýttir til kirkjurnar í presta-gjaldinum.

Hann fegnast eisini um, at so nógv fólk í prestagjaldinum ganga regluliga í kirkju, men hann er tilvitaður um, at hann eisini er prestur hjá teimum, sum bert koma í kirkju av og á og hjá teimum, sum sjáldan ella als ikki koma hagar.

Men vanlagnur raka, ein fyri og onnur eftir.

Serliga heimbygd hansara missir nógv fólk í bestu árum.

Deyðin vitjar ofta og títt í prestagjaldinum.

Jógvan Fríðriksson leggur hornið á telefonini spakuliga á.

Hann kennir seg hjálparleysan og veikan hesa løtuna.

Hann hevur fyri stuttum jarðað tveir mans, sum fórust við trolbátinum *Sjóborgini* út fyri Scrabster í Skotlandi.

Annar var ein ungur strandingur og hin var ein ungur maður, sum var forlovaður við gentu av Strondum.

Júst nú, her í sjálvum jólamánaðinum, fær hann boð um, at *Stathav* er gingið burtur suðuri á Hólmanum og tveir mans eru sjólátnir.

Hann kennir báðar menninar væl.

Annar teirra er av Strondum.

Fær hetta ongan enda?

Á páskum verður prædika í øllum kirkjum í landinum um tann upprisna Krist.

Kirkjufólkið fegnast um Frelsaran, sum vann á deyðanum.

Á skrivstovuni í prestagarðinum í Gjaranesi er Jógvan í holt við at skriva sínar prædikur, sum hann skal halda hesar páskirnar í 1998.

Tað er 2. apríl í dag.

## Oyndarfjarðar kirkja



Tann 25. mai 1837 var gamla kirkjan í Oyndarfirði sýnd og sýnismenninir funnu „ved denne kirke ikke så store mangler, at den jo kan stå uden udbedringer, indtil den ad åre kan være nedreven og af ny opført, hvilket behøves, da den er meget for liden til menigheden".

Kirkjufólkið strongdi á at fáa nýggja kirkju, og myndug-leikarnir eftirlíkaðu krøvunum. Gjørt var av, at nýggj kirkja skuldi byggjast í Oyndarfirði.

Tann 8. apríl var gamla kirkjan eftir boðum frá Føroya Amti seld á uppboði á Eysturoyar vártingi. Treytirnar vóru, at kirkjan skuldi verða tikin niður áðrenn 1. juni 1838.

1. juli byrjaði arbeiði og skjótt gekk. Longu tann 18. august boðar Garde, prestur, amtmanninum frá, at arbeiði er liðugt, og tann 24. august boðar próstinurin, Struer, amtmanninum frá, at vígslan er ásett at verða 12. sunnudag eftir Trinitatis, 2. september 1838.

Fyri arbeiðinum stóð kollfirðingurin David Petersen, sum var búsitandi á Strondum.

Oyndafjarðar kirkja er í høvuðsheitum lík hinum gomlu timburkirkjunum, men skilir seg kortini burturúr, við at hon uttan er hvít við grønum úthurðum og grønum listum um vindeyguni. Men av gomlum kirkjurokniskapum sæst, at hon upprunliga hevur havt svartar tjørubræddar útveggir.

**Kelda:** *Fólkakirkjan*

# Skála kirkja



Í fundarbókina viðvíkjandi Skála kirkju er fyrstu ferð skrivað 10. nov. 1929, tá fimm nevndarlimir møttust hjá Absalon Jacobsen at gera nakrar viðtøkur viðvíkjandi kirkjumálinum.

Nevndin hevur arbeitt skjótt við hesum máli.

H.C.W.Tórgarð, arkitektur, hevur teknað kirkjuna. Ólavsøkudag í 1930 verður bræv sent til Føroya Løgting saman við tekningum og umsókn um at fáa eitt passandi tilskot til at byggja kirkju fyri. Málið kom fyri á tingi fyrstu ferð sama ár. Men málsviðgerðin skuldi vísa seg at verða drúgv.

Í aug. 1935 sendir nevndin eina áminning til Løgtingið um kirkjumálið. Longu í sept. sama ár leggur kirkjunevndin eitt drúgt álit fyri tingið og mælir til, at tingið samtykkir at játta peningaligan stuðul, so skjótt tingið er ført til tess.

Í 1938 kemur málið fyri aftur á tingi. Tá er gjørt kirkjunevndini kunnugt, at kirkjan er farin í gerð. Tí verður sett uppskot um at rinda 3000 kr. innan árslok, og hinar 6000 kr. komandi ár.

Á heysti hetta árið verður P. Buhl Nielsen, sóknarprestur á Nesi, valdur til formann í bygginevndini. Nevndin bað Niels Paula Hansen, byggimeistara á Glyvrum, um at standa fyri stoypiarbeiðinum. Arbeiðið við stoypingini hevur gingið skjótt, tí longu í apríl 1939 varð arbeiðið, at klæða kirkjuna innan, boðið út. Hesum arbeiðið stóð Olaf Rasmussen, timburmaður fyri.

Seinasti fundurin hjá bygginevndini var í sept. 1940, og kirkjan varð vígd sunnudagin 20. okt. 1940 av J. Dahl, prósti.

**Kelda:** *Fólkakirkjan*

Telefonin ringir.

Jógvan Fríðriksson er rættiliga skelkaður, tá hann løtu seinni leggur hornið á aftur.

Trolbáturin *Sjóborgin* er á øðrum sinni gingin burtur.

5 mans vóru við og teir eru allir sjólátnir.

Teir búgva á Strondum.

Unglingar og menn í besta aldri.

Ein vanlukka sum tann, sum rakti 9. februar í 1889, hevur nú aftur rakt bygdina Strendur.

Ta ferðina fór prósturin á Nesi, Jens Chr. Evensen, at hitta tey avvarðandi.

Hesa ferð er tað hann, presturin á Gjaranesi, sum skal hitta tey, sum eftir sita.

Har sita tvær ungar kvinnur hvør sína megin stovuborðið í einum hvítum húsum uppi í Torvbrekku 15.

Tær sita púra kvirrar og stara fram fyri seg. Sansa einki rundan um seg.

Tær eru ikki javngamlar og búgva heldur ikki í sama býlingi, men tær hava eitt til felags.

Tær hava báðar mann á sjónum.

Onnur er nýgift og eigur ein lítlan son saman við manni sínum - hin eigur trý lítil børn við manni sínum.

Ein drong og tvær gentur.

Tann yngsta gentan er bert fáar mánaðir gomul og eitur Simona Paula.

Menninir hjá hesum báðum ungu kvinnunum eru við sama báti.

Báturin er ein trolbátur og hann fiskar væl.

Heilt væl.

Báturin eitur *Sjóborgin.*

*Sjóborgin* er gingin burtur kvøldið fyri.

Inni á Gjaranesi situr presturin, Jógvan Fríðriksson, í einingi og grætur.

Tað er ein kelda til styrki og nakað av vísdómi.

Hann lesur í Halgubók og hevur stillar andaktsløtur.

Prestar eiga ikki at prædika sorgina burtur, hugsar hann.

Teir skulu vera hjástaddir í sorgini og gráta við teimum grátandi.

Tó - sorgin er altíð svár og deyðin er kaldur.

Hann reisist og letur seg í frakkan.

So fer hann út í tún, setur seg inn í bilin og koyrir út á Strendur.

Tað er krevjandi sálarliga og tað er ein avbjóðing at prædika, tá vanlukkan rakar, tí hvat er at siga?

Tað krevur nógv av einum manni at vera prestur á Gjaranesi, tí ein vanlagna rakar fyri og onnur eftir.

Sjúka, vanlukka í ferðsluni og á sjónum.

Uppgávan hjá presti er at kalla ómøgulig, tí deyðin bankar á dyrnar dag eftir dag.

Jógvan Fríðriksson er troyttur.

Eftir 16 ár í kallinum sum sóknarprestur á Gjaranesi kennir hann seg útbrendan og heldur



Asbjørn Mikkelsen, kirkjuráðsformaður á Skála

seg hava givið Sjóvar prestagjaldi tað, sum hann eigur.

At ein nýggjur prestur kemur á Gjaranes heldur hann vera gott fyri allar partar.

Jógvan Fríðriksson flytur av Gjaranesi til Havnar við húski sínum og 25. november í 2007 verður hann vígdur til biskup í Havnar kirkju.

Í 2011 situr Simona Paula í miðhæddini í Stranda skúla og skrivar ein stíl.

Hon gongur nú í sjeynda flokki.

Í stílinum skal hon siga frá einum dreymi.

Simona kom ongantíð at kenna pápa sín, men í dulviti hennara hevur ligið og liggur longsulin eftir eini faðirfyrimynd og eini heilskaptari familju við eini mammu, pápa og systkjum.

Í stílinum sigur Simona frá, at hon hevði biðið til Gud um at sleppa at síggja pápa sín í einum dreymi.

Hon sovnar og droymir, at pápi hennara kemur inn gjøgnum dyrnar heima hjá teimum:

Eg sat í gongini og knappliga kom babba inn. Eg hugdi upp og sá, at tað var hann. Eg visti tað, tí eg hevði sæð so nógvar myndir av honum.

Hann kom longur inn og segði: „Nú eri eg komin, dóttir mín. Eg eri komin aftur til tykkum at búgva".

Eg var málleys og visti ikki, hvat eg skuldi siga. Eg skundaði mær inn í stovuna til systir og beiggja mín og setti meg í sofuna hjá teimum.

Babba sá okkum sita har so fitt. So sigur hann: „Orsakað, at eg havi verið so leingi burtur, men nú eri eg komin aftur og eg fari at vera hjá tykkum í ringum sum í góðum".

Longsulin hjá Simonu eftir at kunna havt ein pápa, sum kundi fylgt henni og systkjum hennara í uppvøkstrinum er eyðsýndur:

Babba kom við mær at hyggja eftir St.ÍF, sum spældi móti Kyndli. Eg var so stolt av at sleppa at hyggja eftir hondbólti saman við babba. Hann hevði sjálvur spælt við St.ÍF, so hann visti alt um hondbólt.

Ein genta, sum sat aftanfyri meg, prikaði meg á ryggin.

Eg vendi mær við og hon spurdi: „Hvør er hasin maðurin?"

Eg vendi mær móti babba og spurdi, um eg kundi siga, at tað var pápi mín.

Babba segði: „Tú mást heldur venja teg við at siga tað".

Eg smíltist til babba og vendi mær móti gentuni aftanfyri meg.

„Hatta er pápi mín", segði eg glað.

Hin beiski og harði veruleikin sníkir seg inn í dreymin. Veruleikin, sum so mong børn í bygdini og runt allar Føroyar hava noyðst at givið seg undir, tá vanlagnan rakar. Simona skumpar hann ikki frá sær, men sannar orðini hjá Ibsen gamla: *Evigt ejes kun det tabte:*

Í dreyminum fór nú alt aftur eftir, skjótari og skjótari.
Knappliga steðgaði tað.
Tá sá eg babba standa einsamallan.
Hann stóð á endanum á bátinum.
Tað vóru so nógvar aldur og báturin fór aftur og fram.
Tað var, sum tað var eitt kamera, sum tók upp.
Tað fór rundan um babba, skjótari og skjótari.
BUMM! So var báturin sokkin.
Eg sá babba. Hann fekk ikki luft og pressaði fyri lívinum.
So fóru eyguni saman.
Har lá hann deyður.

**Keldur:** Jógvan Fríðriksson, Simona Paula á Fríðriksmørk, *Fólkakirkjan*, Poul Klein: *Nøkur minni um Føroyavinin próst Hammershaimb, Varðin, bind 3,* Heini Madsen: *Færøerne i 1000 år*, Jógvan Jensen: *Eitt hundrað ára minni frá 8. februar 1889. Dimmalætting 7. febr. 1989,*
**Myndir:** Fólkakirkjan, M. Eiriksdóttir, A. Gærdum, S. P. á Fríðriksmørk
Ein stutt lýsing av Sjóvar kirkju stendur í greinini: *Erhard var klokkari í 68 ár*



Simona Paula á Fríðriksmørk